# Aftur dansur í Støkkhøllini




*Leygardagin verður aftur dansur í Støkk-høllini, tá X-Rays fer á pallin*

Jákup Mørk

Fyri einum 10 árum síðani var tað ikki á nakran hátt óvanligt, at dansur varð hildin í Støkk-høllini, ella Glyvra Bio, sum tað varð rópt tá.

Bilar tustu úr allari Eysturoynni, og eisini úr Streymoynni, har tað í rættuligan stóran mun vóru havnarfólk, sum fóru sær ein túr inn í Runavíkina, tí dansitilboðini vóru fá ella eingi í Havnini.

Í dag er støðan so at siga viðvend. Dansitilboðini í Eysturoynni eru fá, so skulu runavíkingar og onnur har á leiðini í dans, gongur leiðin aloftast til Havnar.

Nú er so ætlanin at steðga hesum streymi, og væl kendu karmarnir í Støkkhøllini skulu syrgja fyri, at umstøðurnar eru í lagi.

**Orkestur spælur**

Eitt, sum serkendi dansirnar, sum fyrr vóru í høllini, var at talan so at siga altíð var um livandi tónleik, og tað er eisini hetta, sum fyrireikararnir leggja seg eftir.

Talan verður um vælkendu X-Rays, sum seta hol á nýggja táttin, og roknað verður við, at undirtøkan fyri hesum verður góð, tá teir í kvøld trína á pallin.

Eitt líknandi tiltak, eisini við X-Rays, varð roynt á eystanstevnu, og serliga er tað góða uppmøtingin frá teirri royndini, sum ger, at fyrireikararnir nú royna at fáa hetta í eina fastari legu.

**Tungt fíggjarliga**

Tað er sjálvsagt, at tey í áhugafelagnum vóna, at nýggja tiltakið kann vera eitt ískoyti til vanliga raksturin av Støkk-høllini.

Fimleikafelagið Støkk telur í dag ikki færri enn 400 íðkarar, og spennir aldursbýtið úr teimum yngstu upp í fólk í pensiónsaldri.

Fyri fáum árum síðani flutti felagið í Støkk-høllina, og varð tá roknað við, at hendan høllin í størstan mun kundi nøkta tørvin, soleiðis at heilt fitt av hallarleigu kundi sparast.

Í dag er støðan tó tann, at umframt at nýta egnu høll sína so nógv, sum yvirhøvur gjørligt, er eisini neyðugt at leiga seg inn í aðrar hallir, um møguleiki skal vera hjá øllum liðunum at fáa venjingartímar.

Umframt at luttaka í vanligu kappingunum, verður Støkk eisini umboða á fimleikafagnaðinum, har temaið í ár verður »í bygd og bý«. Hetta eru tey í løtuni við at fyrireika seg til, og Støkk hevur nakað at liva upp til á hesum øki. Seinast fimleikafagnaðurin var, í 1998, vann Støkk kappingina.

## VALUTAKURSIR

| | | 15.09.00 | Ultimo august |
|---|---|---|---|
| USA | Dollarar | 862,5900 | 861,6900 |
| Bretland | Pund | 1216,7800 | 1234,9000 |
| Týskland | Markur | 381,8000 | 381,3600 |
| Svøríki | Króna | 88,8000 | 89,2400 |
| Noreg | Króna | 92,8800 | 93,0400 |
| Frakland | Frankur | 113,8400 | 113,7100 |
| Belgia | Frankur | 18,5110 | 18,4900 |
| Sveits | Frankur | 487,6200 | 482,1500 |
| Holland | Gyllin | 338,8600 | 338,4700 |
| Italia | Liri | 0,3857 | 0,3852 |
| Finnland | Markur | 125,5900 | 125,4500 |
| Ísland | Króna | 10,3200 | 10,4000 |
| Eysturríki | Skillingur | 54,2680 | 54,2050 |
| Spania | Pesetas | 4,4880 | 4,4830 |
| Portugal | Escudos | 3,7250 | 3,7200 |
| Kanada | Dollari | 579,9000 | 280,4500 |
| Grikkaland | Drakmur | 2,2060 | 2,2060 |
| Japan | Yen | 8,0174 | 8,1812 |
| Írland | Pund | 948,1600 | 947,0700 |
| | Evra | 746,7400 | 745,8800 |

FØROYA SPARIKASSI



*Frá landsstevnu Javnaðarfloksins í fjør, tá Poul Nyrup Rasmussen var gestarøðari*

# Fjølmiðlarnir við til landsfund Javnaðarfloksins

*Tað er fyrst og fremst fyri opinleikan, at fjølmiðlamir verða bodnir við til landsfundin hjá Javnaðarflokkinum, sigur Hans Jørgensen, skrivari floksins*

Eirikur Lindenskov

Komandi fríggjadag hevur Javnaðarflokkurin landsfund í Havn - og á fyrsta sinni verða fjølmiðlarnir bodnir við á landsfund hjá Javnaðarflokkinum. Aðrastaðni er siðvenja, at fjølmiðlar eru við til hesar stevnur, har politiskir flokkar stinga út í korti framtíðarkósina.

Javnaðarflokkurin hevur fyrr havt fjølmiðlar við til onkran part av fundinum, eitt nú tá Poul Nyrup Rasmussen í fjør var gestarøðari.

Tá Sambandsflokkurin í vár hevði landsfund í Øravík, vóru fjølmiðlarnir eisini bodnir við, hóast bert Sosialurin møtti.

– Tað er sjálvandi fyrst og fremst fyri opinleikan, at vit hava gjørt av at bjóða fjølmiðlunum við, sigur Hans Jørgensen, sum er skrivari hjá Javnaðarflokkinum.

Hans Jørgensen sigur, at tað er siðvenja, at landsfundirnir hjá Javnaðarflokkinum eru rættuliga opnir, tí allir limir í flokkinum kunnu møta og sleppa til orðanna. Hann dylur kortini ikki, at øll ikki hava verið so samd um, at fjølmiðlarnir skulu bjóðast við.

– Tað eru sjálvandi tey, sum halda, at hetta kann órógva orðaskiftið, at fólk fara at halda seg aftur av hesi orsøk. Og tað er væl skiljandi, men hetta er uttan iva ein tilgongd, vit mugu venja okkum við.

Fundurin hjá Javnaðarflokkinum byrjar fríggjakvøldið kl 19 við, at Dreingjakórið syngur tveir vakrar friðarsangir. Høvuðsevnið hetta kvøldið verður annars formansfrágreiðingin, har Jóannes Eidesgaard fer at greiða frá politikkinum hjá Javnaðarflokkinum.

– Hetta verður helst tann parturin, ið fjølmiðlarnir hava størstan áhuga fyri, tí her verður politikkurin hjá flokkinum lagdur fram, sigur Hans Jørgensen.

Seinni hetta kvøldið fer Ole Løwig Simonsen, sum er formaður í tingbólkinum hjá danska Javnaðarflokkinum og næstformaður í Fólkatinginum, at flyta fram røðu.

Umframt formansfrágreiðing so leggur skrivarin eisini fram frágreiðing um organisatoriska arbeiðið hjá Javnaðarflokkinum. Eftir hetta verður kjak um hesar frágreiðingar, sum eisini verður merkt av frágreiðingum frá tingfólkum Javnaðarfloksins.

Av beinleiðis uppskotum, sum verða viðgjørd á landsfundinum, nevnir Hans Jørgensen eitt uppskot frá Suðurstreymoyar Javnaðarfelag, sum avgerð skal takast um hesaferð. Hetta er uppskot um at víðka starvsnevnd floksins frá fimm til sjey limir, at tveir næstformenn skulu veljast og at teir skulu vera av hvør sínum kyni.

Spurdur hvat størsta umrøðuevni verður, heldur Hans Jørgensen, at hann sum skrivari kanska ikki er tann rætti at svara, men hann ivast kortini ikki í, at sjálvstýristilgongdin uttan iva fer at verða nógv umrødd.

– Men almannamálini standa eisini sera frammaliga, nú pensjónsviðurskiftini verða viðgjørd, sigur hann.

# Við í norðurlendskum samstarvi

*Í londunum í útnorði eru javnaðarflokkarnir og arbeiðararrørslan ikki so tætt knýtt sum í skandinavisku londunum*

Eirikur Lindenskov

Landsstevnan er hægsti myndugleiki hjá Javnaðarflokkinum. Hon skal haldast minst fjórðahvørt ár, men annars eftir tørvi. Millum landsstevnurnar er landsfundurin hægsti myndugleiki. Landsstevnan kann broyta virkisskrá o. s. fr., meðan landsfundurin viðger lógaruppskot, politikkin o. s. fr., sigur Hans Jørgensen, skrivari hjá Javnaðarflokkinum.

Landsfundurin velur floksleiðsluna. Hon er hægsti myndugleiki millum landsfundirnar, og har eru umboð úr øllum valdømum, og fáa feløgnini ein lim í hana fyri hvørjar 100 felagslimir tey hava.

Floksleiðslan hjá Javnaðarflokkinum hevur regluligar fundir fýra ferðir um árið, men er okkurt serstakt á skránni, so verður floksleiðslan kallað saman. Tað kann eitt nú vera samgongukreppa ella líknandi.

Landsfundurin velur eina starvsnevnd, sum hevur dagliga raksturin av flokkinum um hendi. Í hana verða vald ein formaður, ein næstformaður, ein skrivari og tveir nevndarlimir.

Frá 1. januar komandi hevur Javnaðarflokkurin eina floksskrivstovu á Gamla Apotekinum í Havn. Í løtuni starvast hann sum skrivari fyri tingbólkin, men hetta virksemið verður víðkað til at umfata alla floksskrivstovuna.

Javnaðarflokkurin er limur í norðurlendska felagsskapinum, Samak. Hetta er felagsskapur fyri javnaðarflokkar og arbeiðarafeløg í Norðanlondum. Í Danmark, Finnlandi, Noreg og Svøríki eru javnaðarflokkarnir og arbeiðarafeløgni við í hesum felagsskapi, meðan í Føroyum, Íslandi og Grønlandi bert javnaðarflokkarnir eru við.

– Í skandinavisku londunum eru javnaðarflokkarnir og verkafeløgini skipað øðrvísi. Tey hava tætt tilknýti, og hava umboð í organisatiónunum hvør hjá øðrum, greiðir Hans Jørgensen frá.



# Avtala gjørd um at leiga havnina á Drelnesi til oljuhavn

*Tvøroyrar Býráð hevur skrivað undir ein sáttmála við eitt oljuútgerðarfelag um havnina á Drelnesi*

Áki Bertholdsen

Tað er nú endaliga greitt, at, at havnin á Drelnesi verður oljuhavn, um tað nakrantíð kemur so langt.

Herfyri skrivaði Tvøroyrar Býráð nevniliga undir eina avtalu, sum gevur einum oljuútgerðarfelag rætt til at leiga havnaøkið á Drelnesi, um ein oljuvinna tekur seg upp, sum hetta sama felag verður uppi í.

Tað er felagið Norserv, sum Tvøroyrar kommuna nú hevur skrivað undir avtalu við um havnina á Drelnesi.

Norserv er eitt føroysktdanskt felag, sum Danbor, ið er dótturfelag hjá donsku risafyritøkuni, A.P. Møller, hevur stovnað, saman við føroyingum.

Tað er Henrik Thomsen á Tvøroyri, sum umboðar føroysku áhugamálini í felagnum.

Annars verður tað Steen Hansen frá Danbor Service, sum verður leiðari á nýggju oljuútgerðarhavnini.

Sostatt er tað greitt, at tekur ein oljuvinna seg upp, sum Danbor og Norserv verða uppí, verður teirra oljuhavn løgd á Drelnesi.



*Tað var ein merkisdagur, tá ið Tvøroyrar Kommuna skrivaði undir sáttmála við eitt oljuútgerðarfelag um at gera havnina á Drelnesi til Oljuhavn. Her eru teir avmyndaðir aftaná, f.v. eru tað Gert Kragelund, stjóri í Danbor Service, Henrik Thomsen nevndarlimur í Norserv, Dan Nielsen, býráðsformaður á Tvøroyri og Steen Hansen, sum verður leiðari á útgerðarhavnini á Drelnesi*

**Vælegnað**

Økið á Drelnesi er 27.940 fermetrar stórt. Og tað er ferð eftir ferð komið fram, at Suðuroyggin er sera vælegnað til oljuhavn, tí hagar er stytst at sigla av ljuleiðunum sunnanfyri Føroyar, og fjørðurin er avbera góður at koma inn á.

–Tað fer at spara oljufeløgunum einar seks tímar í siglingstíð at leggja oljuhavnina á Drelnesi afturímóti aðrastaðni í landinum og tað er rættiliga avgerðandi fyri oljufeløgini, sigur Dan Nielsen, býráðsformaður á Tvøroyri.

Hann sigur, at hetta sama var eisini fatanin hann fekk á oljustevnuni í Stavangri herfyri, har Tvøroyrar Kommuna var við, eins og felagið Norserv.

Dan Nielsen sigur, at ein partur av skránni var at vitja ymiskar fyritøkur, eitt nú varð vitjað á Statoil í Forus, har tað segðist at eini 6.000 fólk arbeiddu.

– Vit fingu eisini høvi at síggja tvær útgerðarhavnir, sum báðar eru í Sola, sum er vinarbýur hjá Tvøroyri.

–Sola kommuna er týðiliga merkt av, at hon fær stórar inntøkur frá oljuvinnuni. Har búgva upp ímóti 19.000 fólk og har sóu vit eitt stórt, sosialt byggjarí til eldri, rørslutarnað og onnur við serligum tørvi.

Har er eisini eitt stórt mentanarhús, sum liggur lítið aftanfyri okkara norðurlandahús, sigur Dan Nielsen.

Hann sigur, at samanumtikið var Noregsferðin væleydnað og styrkti teir í, at teir høvdu góð kort á hondini, tá ið teir bjóðaðu Drelnes fram til oljuhavn.

# Seyðahundar kappast í Kollafirði

*–Teir bestu føroysku seyðahundarnir standa lítið aftanfyri teir skotsku, sum eru tiltiknir, sigur Absalon Hansen, formaður í føroyska felagnum hjá teimum, sum eiga seyðahunbar*

Áki Bertholdsen

Seinnapartin sunnudagin verður ein forvitnislig kapping í Kollafirði.

Tað er nevniliga ein kapping fyri føroyskar seyðahundar.

Kappingin byrjar klokkan tvey sunnudagin, og tá fer tað at bera til hjá øllum, sum hava seyðahund, at koma á Búnaðardepilin í Kollafirði at vita, hvussu seyðahundurin hjá teimum roynast.

Men annars eru øll, sum hava áhuga fyri seyðahundum, vælkomin á Búnaðardepilin hendan seinnapartin, kappingin er.

Tað kann verða fólk, sum ikki hava hund, men, sum kanska ætla at fáa sær hund, og tað kann vera fólk, sum hava hund, men sum ikki vilja bjóða hann fram í kapping enn.

–Øll eru vælkomin til kappingina, at hyggja, men er okkurt at spyrja um, svara vit fegin, og er onkur, sum bara hevur hug til eitt seyðahundaprát, verða eisini góðar stundir til tað, sigur Absalon hansen, sum er formaður í felagnum hjá teimum, sum eiga seyðahundar.

*Nan er annar seyðahundurin Absalon Hansen. Hann verður ikki við í kappingini hesuferð, men næsta ár sleppur hon eisini at royna seg*



Hann sigur, at hesuferð verður tað ein meiri óformlig kapping, har ongin dómari verður.

– Ætlanin við hesi kappingini er fyrst og fremst at hava ein hugnaligan seinnapart, har ið tey, sum hava seyðahund, kunnu hittast at vita, hvussu teirra hundur roynist.

–Kappast verður í ymsum greinum, men hvør eigari ger sjálvur av, hvørjum kappingum hann letur hund sín vera við í.

**Kapping aftur í heyst**

Men Absalon Hansen sigur, at aftaná raksturin í heyst er ætlanin at skipa fyri eini formligari kapping, har meiningin er at fáa ein dómara úr Skotlandi at avgera kappingina.

Formaðurin í seyðahundafelagnum sigur, at tað eru yvir 100 limir úr øllum landinum í felagnum.

– Endamálið við felagnum er at hjálpa teimum, sum hava seyðahund, at fáa teir so góðar sum gjørligt.

– Ein partur av hesum virkseminum er at skipa fyri at venja hundarnar og í tí sambandinum verður av og á skipað fyri tiltøkum í vikuskiftunum, har tað ber til hjá øllum at vera við.

Kappingin sunnudagin er ein liður í hesum arbeiðnum.

Absalon Hansen væntar, at einir 25 hundar vera við í kappingini.

–Nógv teir flestu seyðahundarnir í Føroyum eru Border Collie hundar úr Skotlandi.

Skotskir seyðahundar eru tiltiknir, men hann sigur, at teir bestu seyðahundarnir í Føroyum standa ikki nógv aftanfyri teir skotsku.

– Men so skulu vit eisini hava í huga, at í Føroyum hava seyðahundarnir tað nógv truplari enn í Skotlandi, tí her er so heyggjut, at flesta staðni sæst tað ikki serliga langt.

Absalon Hansen sigur, at tað tað krevur sín mann at fáa ein góðan seyðahund burturúr, tí ein góður seyðahundur krevur ikki sørt av venjing.

Men seyðahundafelagið hevur eisini skriva eina stutta, einfalda leiðbeining við góðum ráðum um, hvussu ein venur ein seyðahund og hana kunnu fólk fáa frá felagnum.

Back-up(6)

VXA-bandstøðir brúka nýggja upptøkutøkni nevnd Discrete Packing Format (DPF). Dáta verða skrivað í pakkum á 64 byte. Hvør pakkin hevur sína egna adressu, og pakkarnir kunnu verða lisnir aftur í tilvildarligari raðfylgju (384 pakkar hvørja ferð). Tá ið dáta verða skrivað á bandið, verða brúkt 2 skrivihøvd og tvey lesihøvd, sum lesa tað, sum er skrivað. Men tá ið dáta verða lisin, verða brúkt 4 lesihøvd (OverScan Operation). Saman við DPF ger hetta, at líkindini fyri at fáa dáta aftur við Ecrix VXA-tøknini er heilt nær við 100%.

Sp/f GEYMAR

Tel. 22 17 87 • geymar@post.olivant.fo

Hygg eisini á www.ecrix.com

*Hans Eliesar, Herbein og Snorri Fjallsbak eiga Geymar*

Sosialurin - 311820